# Fýra spurningar til Mortan

**Fert tú at ferðast í summar?**
- Eg verði verandi í Føroyum - einki er sum vakra og ljósa føroyska summarið. Eg vitji vanliga útlond myrku tíðina av árinum, t.v.s. um heystið og á vetri.

**Var tú og ferðaist í fjør?**
- Í desember mánaði var eg á Lanzarote. Eg vitjaði frítíðar- og ítróttarstaðin Club la Santa. Her hava tey eitt hav av tilboðum til tey, ið ynskja at vera virkin í frítíðini.

**Hvat var tað besta við teirri seinastu feriuni?**
- Tað besta var at sleppa gerandisdegnum heilt. Eg legði fartelefonina eftir heima, hugdi ikki í sjónvarp, hoyrdi ikki útvarp, las ikki tíðindabløð og var ikki á internetinum feriudagarnar.

**Vilt tú viðmæla øðrum at fara á hetta ferðamálið?**
Ja so avgjørt - tí har er okkurt, fyri ikki at siga nógv, fyri øll - børn, vaksin og eldri fólk. Tú kanst vera virkin um tú ynskir tað, men tú kanst so sanniliga eisini bara lata teg baka og brúnka av sólini um tú hevur hug til tess.



*Mortan Hentze býr í Maritugøtu í Hoyvík*

